DAGSINS MEINING

Rúsdrekkalógin

Neyvan er nakað mál í Føroyum so eymt sum akkurát rúsdrekkalógin. Meiningarnar eru nógvar, og til vildar øllum kann eingin gera. Tað eru tey, ið ynskja rúsdrekkabannið aftur, og tað eru tey, ið ynskja rúsdrekka og øl í handlar, eins og eitt nú í Danmark. Føroyska rúsdrekkalógin er onkustaðni mitt ímillum hesi bæði sjónarmið.

Rúsdrekka hevur sínar vansar við sær, og munnu tey flestu verða samd í, at tað almenna onkursvegna má upplýsa og fyribyrgja ovurnýtslu. Ovurnýtsla er ein trupulleiki í Føroyum eins og aðrastaðni, og tí má hettar standa ovast á breddanum, tá rúsdrekkapolitkkur verður orðaður. Rúsdrekkabann nyttar so einki, tað hevur bæði føroysk søga og ikki minst amerikansk søga víst okkum. Upplýsing og frælsi undir ábyrgd má verða vegurin fram.

Tað má ongantíð verða meiningin, at endamálið við rúsdrekkalógini er gjøgnum einkarsøluna at skaffa vinning til landskassan.

Man kann spyrja, hvussu tíðarhóskandi tað er, at man ikki hevur loyvi at lýsa við eitt nú sterkum øli, tá útlendsk vikubløð, internetið, fylgisveinasjónvarp og annað fyllir okkum við reklamum fyri bæði einum og øðrum. Tað nyttar ikki at stinga høvdið í sandin og halda, at væl stendur til, so leingi bert tey føroysku virkini, ið fáast við øl og skeinking ikki sleppa at lýsa. Upplýsing, upplýsing og aftur upplýsing má verða aðalmálið fyri at fyribyrgja. Spurningurin er, hvussu langt man røkkur við sensuri.

Undir øllum umstøðum er gott, at rúsdrekkalógin verður viðgjørd, og er tað rætt at taka hana upp, nú hon hevur verið í gildi í 10 ár. Nógv hendir uppá 10 ár, so kanska tíðin er komin til at gera hana meira tíðarhóskandi, hvat tað so merkir – nógvar meinginar eru um tað, men eitt konstruktivt kjak er altíð gott.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Landsstýrið heldur lærarar sum gíslar

Andras L. Samuelsen

Verandi træta millum landsstýrið og Føroya Lærarafelag er bara ein partur av trupulleikanum í fólkaskúlanum. Ein annar meiri djúptøkin trupulleiki er arbeiðstíðin, ella rættari tann manglandi skipanin og allýsingin av arbeiðstíðini.

Í 1996 gjørdist greitt, at landsstýrið fór ikki at seta fleiri tænastumannasettar lærarar í starv og at teir frameftir skuldu sáttmálasetast, og í sáttmálan skuldi arbeiðstíðin skipast sum ársverk. Landsstýrið og Føroya Lærarafelag gjørdu tí sáttmála um hesa setan. Arbeiðstíðin hjá tænastumannasettum lærarum hevur ongantíð verið allýst, og tá ið so "nýggja" Fólkaskúlalógin, hon er skjótt 5 ára gomul, áleggur lærarunum nýggj krøv og øðrvísi undirvísingarhættir varð eisini neyðugt at umskipa og allýsa arbeiðstíðina áðrenn hon kundi setast í sáttmálan, soleiðis at lærarar fingu møguleika at lúka tey nýggju krøvini, ið lógin ásetir. Fólkaskúlalógin við teimum nýggju ásetingunum og krøvum er øll í gildi í dag og tyngir arbeiðsdagin í skúlanum meira fyri hvønn dag. Við øðrum orðum er ikki nóg mikið, at ásett er hvussu nógvar tímar lærarar skulu undirvísa, men neyðugt er at seta tímar á alt arbeiðið, lærarin ger á skúlanum, tað veri seg saman við næmingum, lærarum, leiðslu ella skúlastýri.

Lærarar hava hesi seinastu fýra árini arbeitt eftir tí nýggja setanarsáttmálanum, tó við tí somu, at kalla ónýtiligu, arbeiðstíðarlýsing, sum tænastumannasettu lærararnir arbeiða eftir.

Í fleiri ár hevur henda nýskipan av arbeiðstíðini nú ligið á láni, hóast at avtalur siga, at hetta skuldi gerast, fyrstu ferð á jóansøku 1997, aðru ferð 3. juni 1998 og seinastu ferð 30. apríl 2000. Hetta til bága fyri lærarar, næmingar, skúlaleiðslu og skúlastýri, men fyrst og fremst fyri fólkaskúlan (sí "Semja millum Føroya Landsstýri og Føroya Lærarafelag", "Semja millum Føroya Lærarafelag og Undirvísingar- og mentamálastýrið" og "Semja millum Føroya Lærarafelag og Figgjarmálastýrið").

Lærararnir hava víst á hvussu arbeiðstíðin kann skipast, men tað tykir sum um at myndugleikarnir ikki hava innlit ella vilja at ganga lærarunum á møti. Landsstýrið hevur sum vera man buktina og báðar endarnar, og so leingi sum tað letur standa til, røkist onki fyri at nakar í hesum landi kann siga nágreiniliga, hvat arbeiði hjá lærararanum umfatar. Hetta gevur spenningar og frustratióníir millum lærarar og leiðslu, lærarar og næmingar, lærarar og foreldur, leiðslu og skúlafyrisiting v. m.

Leiðslurætturin gevur myndugleikanum, til ein og hvørja tíð, rætt til at áseta hvussu arbeiðstíðin hjá lærarum skal skipast. Tað er tí óskiljandi at eitt landsstýri kann lata slík óskipað viðurskifti ráða í fólkaskúlanum í so langa tíð.

Hesa tíð hava ikki minni enn fýra landsstýrismenn við skúlamálum saman við landsstýrismanninum við figgjarmálum havt ovastu leiðslu á skúlanum. Hesir landsstýrismenn hava ikki havt neyðuga dirvið at loyst hetta, fyri okkara fólkaskúla so týdningarmikla, mál.

Øll sum varða av fólkaskúlanum eru nervað av hesum ábyrgdar- og dirvisloysi frá landsstýrismonnunum við skúlamálum, væl hjálpt av landsstýrismanninum við figgjarmálum.

Í roynd og veru kann ein siga, at landsstýrið heldur lærarar sum gíslar, tí tað veit at lærarar ikki sleppa børnunum og teimum ungu upp á fjall.

Foreldur og borgarar, sum lata helmingin av lønini í skatt, til m.a. løgtingslimir og landsstýrislimir, soleiðis at teir skulu hava ovastu leiðslu av fólkaskúlanum v.m., kunnu ikki vera nødd við, at hesir ikki hava dirvi at umsita hendan myndugleika, ella eru so litið semjusøkjandi, at fólkaskúlin liggur í órøkt í áravís.

Hvussu kann barnaansing fíggjast?

Heri Joensen
Foreldur

Seinastu tíðina hevur nógv kjak verði um hvussu og hvør skal fíggja eitt nú systkina-avsláttur. Nú tað stundar til val, eru landspolitikararnir farnir at lova okkum barnafamiljum eina rygvu, men ávísir kommunalpolitikarar hava tað áskoðan at landspolitikararnir skulu halda fingrarnar langt vekk frá barnaansingini, tí hetta er teirra øki. Vit foreldur og børn kunnu vera vís í, at tá ein partur av valskeiðinum er runnið, so vísir tað seg óiva, at landspolitikararnir „tíverri" ikki kundi gera nakað, tí teir fingu eitt sindur av mótstøðu frá kommunal-politikarunum!

Eftir sum landspolitikararnir ikki vita hvat teir kunnu (og eiga) at gera, vil undirritaði geva landspolitikarunum nøkur uppskot til loysn. Broytingarnar kunnu gerðast í kunngerð nr. 6 frá 25. januar 1995 (hereftir nevnd K nr. 6) og í løgtingslóg nr. 67 frá 10. mai 2000 (Ll nr. 67).

Tiltøk sum landspolitikarar kunnu seta í verk:

1. Foreldragjaldið skal hækkast frá teimum 30% sum tað er í dag til eitt nú 40% (§1 í K nr. 6 og §6 stk 1 í Ll nr. 67)
2. Fríplássmarkið skal hækkast samsvarandi pkt. 1 (§6 stk 2 í K nr. 6)
3. Systkinaavsláttur
4. Krevja ansingartrygd

Avleiðingar av tiltøkunum:

a) Landskassin rindar sín part við tað at fríplássmarkið hækkar
b Kommunan rindar sín part tí kommunan við ansingartrygdini verður noydd at nøkta tørvin fyri ansingarplássum. Alt eftir hvussu landsstýrið ásetir gjøldini undir punkt 1 og 2 omanfyri skal kommunan bara rinda fyri eyka húsaútreiðslur. Hetta hevur kommunan tó møguleikar fyri at sleppa undan við verandi lóggávu (t.d. Føroya Tele).
c) Foreldrini við fleiri børnum og lágari inntøku skulu gjalda minni til barnaansing
d) Foreldur við einum barni og høgari inntøku skulu gjalda meiri til barnaansing

Um viljin hjá landspolitikarunum er til staðar at loysa trulleikarnar ber hetta sagtans til við smáum lógarbroytingum.

Undirritaði sigur við hesum ikki at núverandi skipan er tann mest optimala. Um samlaða ansingar og útbúgvingartilboðið til børn og ung skal gerast betri krevur tað politikarar við visiónum fyri samfelagið. So eg biði í spenningi eftir at nakar politikari við hesum eginleikunum stillar upp til løgtingsvalið í apríl.

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri:
Jan Müller jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri:
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
Tiðindaleiðari:
Justinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Myndamenn:
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstoðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin

Avgreiðsla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjáplásss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VALGREINAR

Økismenning um alt landið

Jaspur Vang,
Valevni hjá sambandsflokkinum í Suðuroy

Tað er at fegnast um, at føroyski landsbúskapurin sum heild er betur fyri enn nakrantíð. Tá saman um kemur, er tað tó ein spurningur, hvørt øll øki í landinum búskaparliga eru komin seg eftir kreppuna fyrst í 1990-unum, og hvørt landspolitiskur vilji hevur verið - og er til at skapa neyðugu fortreytirnar fyri menning um alt landið.

Suðuroy eftir kreppuna
Hvat Suðuroynni viðvíkur er støðan tann,

- at fólkatalið í oynni í dag er uml. 15 % lægri enn undan kreppuni,
- at aldursbýtið er avlagað, t.v.s. at talið á ungum fólki og fólki í vinnuførum aldri er fallið í mun til talið á eldri fólki,
- at tær báðar størstu kommunurnar í oynni lutfallsliga eru tær mest skuldarbundnu í landinum,
- at talið á arbeiðsplássum,ið krevja hægri útbúgving, lutfallsliga er ov lágt,
- at undirstøðukervið tørvar munandi ábøtur, og
- at vinnulívinum í oynni m.a. tørvar betur fíggingarmøguleikar.

Kanningar og hagtøl hava staðfest óhepnu støðuna, sum ikki einans ger seg galdandi í Suðuroynni, men eisini í øðrum útjaðaraøkjum.

Tað er týdningarmikið at gera sær greitt, at fallið í fólkatalinum og serstakliga avlagaða aldursbýtið í sjálvum sær føra við sær fall í burðartíttleikanum, enn størri fall í fólkatalinum og harvið eitt enn meira avlagað aldursbýti. Harumframt førur m. a. tørvurin á arbeiðsplássum, ið krevja hægri útbúgving, við sær, at ungdómur, ið nemur sær hægri útbúgving, ikki kemur aftur í oynna. Talan er sostatt um "óndar ringrásir", sum, verða tær ikki steðgaðar, kunnu taka grundarlagið undan framhaldandi virksemi og trivnaði í økinum.

Inntøkurnar frá fiskivinnuni og alivinnuni eru í løtuni høgar og rímiliga stoðugar, eins og fólkatalið í eitt nú Suðuroynni hevur lagað seg eftir búskaparstøðuni (fráflytingin). Samstundis leita stórir partar av arbeiðsmegini í útjaðaraøkjunum í Føroyum sær arbeiði aðrastaðni, men hava enn bústað sín í útjaðaraøkjunum. Hettar er serstakliga galdandi fyri okkara sjófólk og handverkarar. Beint nú er ávísta afturgongdin tí kanska ikki eins sjónlig og hagtøl og kanningar vísa.

Undirstøðukervið í Suðuroynni
Tað er ein sannroynd, at undirstøðukervið í einum øki er ein avgerðandi fortreyt fyri vinnuligari menning og trivnaði annars í økinum.

Tí er tað neyðugt, at fyrst og fremst vegastrekkini Øravík - Hov, Trongisvág - Hvalba - Sandvík og vegastrekkið Øravík - Fámjin, sum skjótast verða dagførd.

Hvat sjóvegis sambandinum um Suðuroyarfjørð viðvíkur, eru batar í væntu, nú farleiðin í evstu løtu verður dagførd við nýggjari ferju.

Ein nýggj ferja fer tó ikki at loysa trupulleikan vinnulívið í Suðuroynni hevur av meirkostnaðinum í samband við farmaflutning.

Spurningurin er tí, í hvønn mun tað er rímuligt og í samsvar við viljan til økismenning, at útreiðslurnar til farmaflutning um eitt nú Suðuroyarfjørð skulu vera so nógv hægri, enn útreiðslurnar til farmaflutning eftir landsvegi.

Tá saman um kemur, er nevniliga eingin munur á at ferðast eftir almennum landsvegi og gjøgnum almenn berghol, og at ferðast sjóvegis við almennari ferju. Tí eigur málið at verða tikið upp til landspolitiska viðgerð.

Fíggingin av vinnulívinum
Dømi eru um, at føroysku fíggjingarstovnarnir krevja størri trygd fyri lánum til vinnuna í útjaðaraøkjunum, enn fyri lánsveitingum til vinnuna aðra staðni í landinum. Tí er neyðugt at umhugsa at fáa í lag grunn ella stovn, sum í størri mun er førur fyri at meta um - og átaka sær váðan í samband við lánsveitingar til vinnulívið í útjaðaraøkjunum í Føroyum.

I hesum sambandi kann nevnast, at stórur partur av teirri endurmenning av vinnulívinum, sum hóast alt er farin fram í Suðuroynni seinastu árini, er fíggja uttanlands.

Lokalt samstarv
Í útjaðaraøkjum sum eitt nú Suðuroynni er tað neyðugt, at vinnuvirki samstarva, og at kommunurnar í oynni í nógv størri mun samstarva tvørtur um kommunumørk, eins og tað er neyðugt, at landspolitikararnir í økinum í størri mun standa saman um alla oynna.

Saman við ábøtum á undirstøðukervið, lægri fluttningskostnaði í samband við farmaflutning til - og úr oynni, betur fíggingarmøguleikum og betur samanhaldi og samstarvi lokalt, høvdu fortreytirnar fyri øktum vinnuvirksemi í Suðuroynni verið munandi betur.

Trivnaðurin í útjaðaranum
Umframt betur fortreytir fyri vinnulívsmenning, er neyðugt at menna - og fjølbroyta arbeiðsmarknaðin í útjaðaraøkjunum, soleiðis at lønarinntøkurnar í hesum økjum hækka og gerast støðugari. Ein størri og meira fjølbroyttur arbeiðsmarknaður hevði tryggja útjaðaraungdómi, ið nemur sær hægri útbúgving, nøktandi arbeiði at koma aftur til. Eisini spurningurin um kommunuskuldina, sum er ein stórur trupulleiki hjá ávísum kommunum í útjaðaraøkjunum, átti at verið endurskoðaður, soleiðis at hesar kommunur, javnbjóðis øðrum kommunum í landinum, kundu veri við til at skapt vinnulívinum betur karmar at virka undir og íbúgvunum størri trivnað.

Niðurstøða
Hóast Føroyar búskaparliga ikki hava verið betur fyri enn seinasta valskeiðið, hevur tað ikki verið landspolitiskur vilji til at endurmenna øll øki í útjaðaranum.

Hin vegin er blokkstuðulin skerdur við uml. 360 mió. krónum og m. a. rakstrarútreiðslurnar hjá landshúsarhaldinum hækkaðar munandi. Henda gongdin vísir púra greitt, at spurningurin um ríkisrættarligu støðu Føroya hevur verið prioriteraður munandi hægri enn vælferðin og trivnaðurin hjá einstaka føroyinginum.

Um landspolitiski hugburðurin verður broyttur, og røttu fortreytirnar skaptar í útjaðaraøkjunum í Føroyum, er fyri mær eingin ivi um, at útjaðarin fer at endurreisa seg.

Á komandi løgtingsvali verður tað tí ein spurningur um at atkvøða fyri frælsinum til at virka - og búseta seg um alt landið.

Vel eina Fólkafloks-kvinnu á ting

Annika Olsen
Cand.mag.
Valevni Fólkafloksins í Suðurstreymi

Løgtingsformaðurin ger í Dimmalætting Skírisdag nakrar viðmerkingar til uppstilling av kvinnum til løgtingsvalið. Antin er soðið ov tunt hjá løgtingsformanninum, ella hevur hann eitthvørt ítøkiligt dømi um hetta fra sínum egna flokki ? Eg haldi ikki, at tað er generelt, at kvinnur forða øðrum kvinnum í at stilla upp og harvið eru ov fáar á listunum, men meira tað, at tær sjálvar ikki hava hug.

Eg eri heldur ikki samd við løgtingsformanninum í, at mannfólkini vilja spjaða kvinnuatkvøðurnar við at hava so nógvar kvinnur á listanum sum gjørligt. Í dag hoyrir tað seg til, at kvinnur skulu vera við, og at roynt verður at fáa nakrar kvinnur við á listan.

Vanin størsta forðingin
Tað hava verið mangir mannligir kvinnuforkemparar upp ígjøgnum tíðirnar. Eingilsmaðurin og liberalisturin John Stuart Mill (1806-1873) var ein tann fyrsti og mest týdningarmikli undangongumaðurin fyri rættindi kvinnunar. Verk hansara, The Subjection of Women (1869), fekk stóran týdning fyri, at kvinnur í Onglandi fingu atkvøðurætt og møguleika fyri at luttaka í politikki. Hetta verk hevur í heila taki havt stóran týdning fyri politiska og demokratiska rættin hjá kvinnunum í Evropa upp gjøgnum tíðina.

Tað er ikki longur nøkur forðing hjá kvinnum í norðanlondum at luttaka í politikki. Í dag er tað tíverri vanin, sum er størsta forðingin fyri, at vit ov fáar kvinnur eru við í politikki, og um ikki vanahugsanin verður broytt, kemur eingin framburður at henda. Tað er ein vani, at menn stilla upp, samstundis sum tað er ein óvani, at ov fáar kvinnur halda seg til á politiska pallinum. Vanin er allarstørsta forðingin fyri framburði á kvinnupolitiska økinum.

Eg fari tó at geva løgtingsformanninum rætt í tí, at lóg skal eingin gerast fyri, at eins nógvar kvinnur sum menn skulu vera á listunum. Tað skal vera ein fríur rættur fyri ein og hvønn, íð hevur hug og evni at fara upp í politikk.

Føroyskar kvinnur vælegnaðar til politikk
Í Føroyum hevði kvinnan valrætt langt áðrenn teir nærmastu stóru grannar okkara fyri sunnan góvu kvinnunum valrætt. Í Føroyum hevur kvinnan altíð verið høgt í metum, passa hús og heim, stýrt figgjarmynstrinum og uppalt børnini, meðan maðurin hevur stríðst við Íslands- og Grønlands strendur.Tað er harmiligt, at alt ov fáar kvinnur verða valdar á ting. Kvinnur eru vælegnaðar til at stýra Føroya landi. Tað hava tær prógvað ígjøgnum mong mong ár við at ansa eftir hvørjari krónu heima við hús. Tær hava verið vanar at administrera peningin væl, og tað høvdu tær eisini gjørt sum politikkarar.

Ger hetta valið til eitt kvinnuval. Vel eina Fólkaflokskvinnu á ting.

Gott fólkafloksval.

www.annikaolsen.net

VHF-trygdin hjá fiski-og útróðramonnum

Tordur J. Niclasen
valevni Miðfloksins í Eysturoynni

Málið at bøta um trygdina hjá fiski- og útróðramonnum varð samtykt,men í meir enn 4 ár súltað í landsstýrinum.

Spurningurin viðvíkandi VHF viðurskiftunum hevur aftur verið frammi. Havandi trygdina hjá fiski- og útróðramonnum í huga, varð tað, at undirritaði, vegna Miðflokkin, 19. september 1997, legði uppskot á ting, soljóðandi:

"Við atliti til at bøta um trygdina á sjónum verður heitt á landsstýrið um at fyrireika og leggja løgtingslógar-ella ríkislógartilmælisuppskot fyri tingið, sum skapa fortreytir fyri, at VHF sendinetið verður útbygt soleiðis, at VHF samskiftið við land verður møguligt á allari innaru landleiðuni."

Eftir 1. viðgerð fór málið í Mentunnarnevndina og tá tað kom aftur vísti tað seg, at tað var bert umboðið hjá Miðflokkinum í nevndini, sum mælti tinginum til at samtykkja uppskotið.

Men tá avtornaði varð uppskotið samtykt! Úrslitið av atkvøðugreiðsluni gjørdis, at 14 vóru fyri, 13 ímóti og 1 atkvøddi blankt.

Undirritaði hevði fleiri ferðir áður gjørt vart við vána viðurskifti fiski-og útróðramanna hvat VHF-hoyrilíkindum, serlgia norðanfyri, viðvíkti! Tí var tað at fegnast um, at uppskotið nú enduliga vann frama og at løgtingið hevði álagt landsstýrinum at fara til verka!

Men eftir øllum at døma, so tykist hetta álvarsmál viðvíkjandi trygdini hjá fiski-og útróðramanninum, ikki hava havt serliga høga prioritering, hjá "fullveldis landsstýrinum", tí enn er støðan óbroytt - hóast løgtingið á sinni samtykti uppskot Miðfloksins.